*Bretskt ráðgevarafelag um føroyska økið:*

# -Tað sær lovandi út

Tað sigur ikki so lítið um týdningin, sum bretar leggja í komandi oljuøkið millum Føroyar og Hetland, at BP í løtuni ar beiðir við tí størstu seismisku kanningini nakrastaðni í heiminum. Hesar kanningar byrjaðu av álvara í summar og verður í løtuni arbeitt við at viðgera upplýsingarnar.

Sambært á skjølum, sum Sosialurin hevur fingið atgongd til, so síggja úrslitini frá kanningunum, sum longu eru klár, sera lovandi út. Tann bretska ráðgevandi fyritøkan "Scott Pickford Group", sum tekur sær av ráðgeving í sambandi við kanningar og oljufram leiðslu, skrivar í einum brævi til ein kunda, at bretski oljuídnaðurin leggur sera stóran týdning í kanningarnar, sum verða gjørdar í einum stórum øki eystan fyri miðlinjuna millum Føroyar og Hetland.

Fyritøkan vísir á, at sera umfevnandi seismiskar kanningar verða gjørdar í hesum økinum, sum liggur beint upp at føroyska markinum ella "hvítu" leiðini millum londini.

Talan er um eitt øki upp á 1600 km, sum verður kannað. Fyritøkan sigur, at upplýsingarnir, sum higartil eru fingir til vega, eru av sera góðum slag "The seismic results in a technical sense are exellent, and from a prospectivity point of vieww are very exciting". Umframt seismiskar kanningar eru eisini gjørdar magnetiskar kanningar úr flogførum, sum hava verið yvir økinum í summar.

Á oljuráðstevnuni í Havn leygardagin kom annars fram, at fakfólk meta, at løgini við før oyska markið, har BP hevur funnið eina risastóra oljukeldu, uttan iva halda fram føroyskum megin markið. Hetta er ikki nakað, sum kann váttast, men fakfólk hava koruni - sjálvandi út frá upplýsingum og fakkunnleika - loyvt sær at "gita", at møguleiki er fyri, at hesi oljuførandi løgini eisini finnast í okkara øki.

jan




*Hetta er tað nýggjasta kortið av oljuøkjunum á Føroyaleiðunum, sum BP hevur gjørt og sum Sosialurin hevur útvegað sær. Kortið er frá 1993 og á tí eru eisini avmerktar tær báðar oljukeldurnar, sum BP og Amerada Hess hava funnið í blokki 204 beint við føroyska markið.*



*Partur av brævinum frá eini bretskari ráðgevarafyritøku sum svar upp á ein fyrispurning frá kunda*




*Pílurin vísir tað rættiliga stóra økið rundan um oljukelduna í blokki 204, sum bretar nú seta alla orku og pening í at kanna. Kanningarnar eru við fleiri av heimsins mest framkomnu seismisku skipum, og harumframt eisini magnetiskar kanningar frá flogførum.*

Sosialurin – fimm ferðir um vikuna!